Dokking av M/F Smyril oktober 2008.

Í sambandi við at M/F Smyril hevur trupuleikar við stabilisaturunum, eru vit saman við japansku Mitsubitshi verksmiðuni, blivin samd um at seta skipið í dokk. Hettar fyri endaliga at fáa staðfest og umvalt brekið/brekini, sum hava verið við finnunum, líka síðan skipið kom úr Spanien í 2005.
Vit hava við kavarum, roynt at hildi finnunar í drift vertrarhálvina og hettar hevur verið eitt tung og dýrt arbeiði .

Samanlíknað við síðsta vetur sær trupuleikin út til at versna, og eg vil ikki ráða til at skipið fer undir enn ein vetur við hesum breki. Í ringasta fall kan núverandi brek hava við sær, at vit ikki fáa finnurnar inn uppá pláss, tá skipið skal til kaj og at skipið hervið ikki fær lagt at.

Umboð fyri verksmiðuna hava verið í Føroyum og hugt uppá trupuleikan. Garantitíðarskeiðið er farið. Eftir samráðingar varð avtalað gjørd, at verksmiðan avheldur allar útreislur í samband við eykalutir til finnurnar.

Út yvir tað koma so útreiðslir til sjálva dokkingina, avloysaraskip, eykamanning v.m.

| | |
|---|---|
| Inn/ útdokking og dokkuppihald 13 døgn | 146.000.- |
| Arbeiðsløn 8 mans 2 skiftihold í 13 døgn | 2.120.000,- |
| Leiga av St. Ola 30 dagar | 2.700.000,- |
| Kavaraarbeiði /Forarbeiði | 1.000.000,- |
| Oljuútreislur fyri bæði skipini | 2.122.000,- |
| Manningarútreislur | 650.000,- |
| | |
| íalt | 8.838,000,- |

Inspektørur
Conrad Gaard Joensen